# Føroyar tiknar av skránni

**Fram til í fríggjadagin stóðu Føroyar á skránni á almennu heimasíðuni hjá Kenny Rogers, men nú eru konsertirnar á klettunum burtur. – Eg veit onki. Tað veit Gud. Men vit fara at tosa við managaran hjá Kenny í kvøld, og tá vita vit, sigur Hans Jørgen Djurhuus frá Sp/f Holmen**

KONSERT
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Stórur ruðuleiki hevur valdað kring konsertirnar, sum Kenny Rogers skuldi halda í Føroyum í septembur, síðan Sosialurin avdúkaði, at hetta helst ikki bleiv til veruleika og at fyriskipararnir ikki vóru at finna.

Eftir at greinin var prentað komu fyriskipararnir fra, og í gjár komu teir við einum telduposti, sum vísti at rinda teir eina ávísa upphædd, so kemur Kenny Rogers til Føroya kortini.

Nú er ein nýggj vend í málinum, sum bendir á, at ongin konsert verður. Nú eru Føroyar tiknar av skránni á almennu heimasíðuni hjá Kenny Rogers.

Hetta hendi einaferð seinnapartin í gjár.

Føroysku fyriskipararnir lovaðu fríggjadagin at koma við einum endaligum prógvi mánadagin, sum sigur, at Kenny Rogers kemur. Men í dag er mánadagur, og onki prógv er komið.


*Eigararnir av Sp/f Holmen hava framvegis vónir um at bjarga Kenny Rogers konsertunum. Men sambært teimum sjálvum sær ikki alt ov gott út*

## - Eg veit onki

Hans Jørgen Djurhuus, ein av teimum, ið skuldi skipa fyri konsertunum í Føroyum, sigur, at beint nú er øgiliga lítið at frætta um Kenny Rogers.

Spurdur, hvussu møguleikin er fyri, at Kenny Rogers kemur til Føroya er, er hann serstakliga spakur.

- Eg veit onki. Tað veit Gud. Men vit fara at tosa við managaran í kvøld, og tá vita vit um hetta verður egg ella ungi, sigur hann.

Og leggur afturat, at Benny við Sandá veit helst meira.

Men Benny við Sandá tekur ikki telefonina.

## Fáa pengarnar aftur

Hans Jørgen Djurhuus greiðir somuleiðis frá, at skuldi alt farið, so fáa fólk pengarnar aftur.

- Fólk fáa pengarnar aftur, um onki skuldi blivið. Men vit selja framvegis atgongumerkini, sigur Hans Jørgen Djurhuus.

Spurdur um peningurin er til, so er hann avgjørdur á fyrsta sinni.

- Teir eru fastir. So teir pengarnir eru til, staðfestir hann.

Brúkaraumboðið vísir á, at fólk hava krav uppá, at fáa peningin aftur, og at skuldi felagið farið á húsagang, so er talan um eitt heilt annað mál, sum hann ikki kann gera nakrar serligar gitingar um.

## Okkurt løgið

Hinvegin váttar hann, at okkurt undarligt er gingið fyri seg, men vil ikki koma inn á, hvat tað í veruleikanum er.

- Tá vit vita, hvussu verður, so skulu fólk nokk fáa at vita, hvat er gingið fyri seg, sigur hann.

Tí kunnu vit staðfesta, at hóast prógv skuldi koma í dag, um at Kenny Rogers kemur til Føroya, so fáa vit onki tílíkt, samstundis, sum vit kunnu staðfesta at tað ikki hevur gingið nakað serligt hjá Sp/f Holmen seinastu tíðina.




*Fram til fríggjadagin stóðu tvær konsertir í Føroyum og onkur í Norðurlondum á skránni í septembur. Nú er onki at finna nakrastaðni*